


# Ársætlan 2009

# Samandráttur av ársætlan 2009

Meginraðfestingar (fokus hjá øllum deildum):
- Felags journalskipan
- Skipa viðskifta- og kunningartænastu
- Fakligar greinar um mál av týdningi fyri stovnin

Skrivstovusamskipanin
- TotalView uppbyggjast
- Bil&persónsbók moderniserast
- Virðir í arbeiðinum: Besta tænasta, Opinleiki, Nøgdsemi o.s.fr.
- Annars:
    - Uppbygging av lærlingapolitikki
    - Búnar til starvsfólk

  Týðandi virksemi komandi ár samb. árssamrøðu Súsan
    - Betri innlit í arbeiðsinnihaldið hjá starvsfólkunum á deildini
    - Fáa tinglýsing og matrikulering at virka betur saman í on-line samskifti
    - Uppbyggja viðskiftamóttøku
- Týðandi virksemi komandi  ár samb. árssamrøðu Ronnie
    - Journaliseringsskipanin uppbyggjast í fyrsta hálvári
    - Virknari arbeiðsmannagongdir – serliga innan kundamóttøku og –avgreiðslu
    - Ábøtur innan umhvørvislóggávuna,- serliga einnýtisíløt o.t.
    - Broytt tinglýsingarkunngerð
    - Fylgja menningini av teimum skráum, sum stovnurin hevur ábyrgd av
    - Fakliga útgreining um týðandi arbeiðsøki

Kort & Skráir
- Nýtímansgerð av geodætiska grundarlagnum
- Útboð av nýggjari landsfólkayvirlitsskrá
- Felags GIS virksemi uppbyggjast
- Annars:
    - Fotoflúgving
    - Menning av heimasíðuni
    - Fyrireiking av kortstjórafundi 2010
- Týðandi virksemi komandi ár samb. árssamrøðu
    - Landsnet ábyrgdin og tøkniliga serviseringin
    - Telduuppseting og  tøkniligir hentleikar
    - Integrering av skráum, LFY, TL, Matrikul, Fólkateljing o.l.
    - Fakliga útgreining um týðandi arbeiðsøki

Lendi

- Minking av sakartalinum
- Sakarviðgerðartíðin fyri vanlig mál niður undir 3 mðr.
- Menna nýggja journalskipan innihaldandi verandi funktiónum
- Annars:
  - Effektivisera arbeiðsmannagongdir
  - Móttøka av spurningum og umsóknum í viðskiftamóttøku
  - Betri hagtøl
  - Skanning av mátibløðum og savni saman við K&S
  - Dygdin á matrikulkortum betrast
  - Bøtt mátitøkni
  - Søgan hjá stovninum lýsast
  - Útskiftingin haldast í gongd
  - Fáa greiðu á býarskipanarvirkseminum
  - Lofta matrikullógarbroytingum
  - Menna planleggingina
  - Planskrá
  - Menning og rekrutering av starvsfólki
- Týðandi virksemi komandi ár samb. árssamrøðu
  - Sakartalið minkast til natúrligt støði
  - Avkláring uppá býarskipanarnevnd
  - Umlegging av journaliseringsskipanini
  - Viðskiftaavgreiðsla í neðra
  - Ábøtur innan planlegging og skráseting
  - Upplæring av nýggjum landmátara
  - Fakliga útgreining um týðandi arbeiðsøki

Vernd

- Munandi fleiri umhvørvisgóðkenningar gerast
- Umhvørvishagtøl & partar av “Føroya Umhvørvi í Tølum” sjónliggerast á heimasíðuni
- Føroysk uppfylging á veðurlagsøkinum
- Annars:
  - Náttúruverndarlógin og uppbygging av náttúruverndarfyrisiting
  - Kortleggingar gerast
  - Temadag um kemikaliir
  - Tilbúgvingarætlan gerast liðug
  - Órudd og burturkast raðfestast
  - Mánaðarlig eftirlitsætlan
  - Eftirmeting av skipanini við einnýtisíløtum
  - Spillivatnsstatus gerast
  - EMS – light at virka á US
- Týðandi virksemi komandi ár - árssamrøða
  - Sikkur veðurlagshagtøl, serliga fyri skip
  - Umhvørvisgóðkenningar raðfestast frammarlaga, serliga skipasmiðjur, oljugoymslur og flogvøllur.
  - Fakligar útgreiningar um okkurt av týðandi arbeiðsøkjunum

Gransking

- Føroysk umhvørviseftiransingarætlan gerast
- Mannagongdir fyri kanningar gerast
- Menna sýnisprøvabankan
- Annars:
  - AMAP kanningar
  - Ymiskar aðrar kanningarætlanir
- Týðandi virksemi komandi ár- árssamrøða
  - Gera arbeiðið breiðari, meira supportrættað og umfata allan stovnin
  - Ábøtur innan vitanargreining og kunning
  - Fakliga útgreining/frágreiðing um týðandi arbeiðsøki

Viðarvøkstur & Frílendi

- Arbeitt verður víðari við ætlanini um nýggjar driftsbygningar
- Kunningartilfar um plantur, plantuhandfaring og val av plantutilfari til viðskiftafólk
- Menna alingina av føroyskum uppruna viðarvøkstri
- Annars
  - Eginframleiðslan av trøum og runnum verður ment
  - Trærøkt í skógfriðaðum viðarlundum, gøtuskipan v.m.
  - Bøta um skelting, ruskíløt beinkir o.tíl. í viðarlundunum
  - Ymiskt annað virksemi
- Týðandi virksemi komandi ár - árssamrøða
  - Fáa tikið støðu til, hvussu nýbygging kann fremjast í Hoydølum
  - Økið frá Boðanesi - Hoydalar og økið á Tvøroyri fyrireikast
  - Modernisera lóggávuna innan skógfriðingarøkið
  - Fakligar útgreiningar um okkurt av týðandi arbeiðsøkjunum

# Ársætlan 2009

Ætlanin fyri 2009 er í stóran mun at gera skipanir, sum skulu fáa samskiftið við viðskiftafólk at virka væl og skjótt. Samanlegging av ymisku stovnunum og arbeiðsøkjunum er í høvuðsheitum av, men enn eru ávís sera týðandi øki, sum ikki eru fingin uppá pláss. Serliga er stórur tørvur á eini nýggjari felags journalskipan, og verður løgd stór orka í, at fáa hetta uppá pláss í fyrru helvt av árinum.

Kjarnuvirksemið á stovninum er skráseting, at taka avgerðir og at veita leiðbeining og kunning. Umsiting av viðarlundum og øðrum frílendum, saman við veitingarvirkseminum av plantutilfari á Gróðurstøðini, eru týðandi borgaratænastur. Umleggingar og tøknilig átøk eru neyðug, fyri at somu fólk kunnu veita fleiri og betri tænastur samsvarandi tí støðugt vaksandi tørvi. Ein málsavgreiðslutíð skal ásetast, soleiðis at mál ikki koma at liggja ov leingi á stovninum.

## Skrivstovusamskipan

Uppbyggin av einum meira málrættaðum samskifti við okkara viðskiftafólk, soleiðis at stovnurin gerst ein sera opin og kundavinaligur stovnur, er eitt øki, sum dentur verður lagdur á í árinum. Serliga kemur hetta at verða skipað í einum viðskiftadepli kring móttøkuna, har mest møgulig avgreiðsla og samskifti við viðskiftafólk skal savnast. Góð tænasta til viðskiftafólk skal byggja á: skjóta avgreiðslu, vinaliga tænastu, kunnandi telefonavgreiðslu og økta portalservisering.

Ábøtur á telefonskipanina stendur frammarlaga. Ein TotalView skrásetingarskipan verður innarbeidd í februar. Við hesi skipan fæst ein neyvari arbeiðsskráseting, eins og tey, sum ringja inn, koma at fáa neyvar upplýsingar um, hvørt starvsfólk eru tøk ella ikki.

Ein skipan, har persónar við ábyrgd av telefonmóttøku skulu kunna avgreiða mest møgulig mál, skal uppbyggjast. Nýggja skipanin við viðskiftadepli og úttømandi telefonavgreiðslu kemur at krevja eina neyva og væl atkomuliga journalskipan. Her kemur nýggja journalskipanin, 360 Sharepoint, at verða arbeidd upp í vár.

Skeið verða hildin í almennum innliti og í nýggju journalskipanini fyri øll starvsfólk.

Innan tinglýsing verður dentur lagdur á, at fáa bil & persónsbókina digitaliseraða eftir sama leisti sum nýggja tingbólkin. Landsfólkayvirlit verður moderniserað samsvarandi nýggju lógini. Útgreiningararbeiðið er í gongd, og verður útboð fyri gerð av nýggjari skipan í árinum.

Teldutøkt samskifti við landsfólkayvirlit, matrikul, adressur og tinglýsing skal mennast. Adressuskráin kann tengjast saman við tinglýsingarskránni, soleiðis at til ber at sláa adressuna upp í tinglýsingini. Eisini skjøl, sum lendi gevur tinglýsingini, skulu kunna latast teldutøk.

Skanning av gomlum tinglýsingarjournalum og søguligum lendistilfari skal setast í gongd í árinum, soleiðis at til ber at arbeiða uttan pappírs- og skjalagoymslur. Hervið gerst møguligt at minka um verandi pappírsnýtslu og goymslu.

Í innanhýsis samstarvinum ímillum deildirnar skal GIS virksemið raðfestast.

Kunningarvirksemi skal gerast meira sjónligt, og tryggjast skal, at allar funktiónir á stovninum verða gjørdar sjónligar á heimasíðuni. Upplýsandi tiltøk, ella tilfar til advokatfeløg og bankar um tinglýsing, er somuleiðis aktuelt.

Arbeiðast skal við at fáa felags búnar til starvsfólkið, serliga til tey, sum javnan arbeiða úti. Í samband við skrivstovunæmingar skal gerast ein innanhýsis lærlingapolitikkur.

*Virðir í arbeiðinum*
Tað er ábyrgdin hjá Skrivstovusamskipanini at varða av skrivstovuarbeiðinum fyri allan stovnin, og at tryggja kundanum bestu tænastu og nøgdsemi, tá tað kemur til kundarøkt á Umhvørvisstovuni.

Við opinleika og førleika vil stovnurin veita skjóta tænastu og ráðgeving, har kundin verður settur í fokus, og tikið verður støði í hansara tørvi.

Stovnurin hevur sett sær fyri at:
- ganga á odda og veita bestu tænastu
- verða kend fyri okkara opinleika og førleika
- vera professjonell í okkara atferð
- hava tey dugnaligastu og mest effektivu fólkini í arbeiði

Áræði – nýhugsan og ábyrgd.
Áræði skapar framgongd.
Áræði flytur mørk og skapar nøgdsemi millum starvsfelagar og kundar
Vit hava dirvi og áræði at finna nýggjar leiðir og loysnir.
Úrslitið sæst í, at vit alla tíðina søkja eftir og eru opin fyri nýggjum áhugaverdum og betri møguleikum, vit eru ábyrgdarfull og hugsa sjálvi.

Opinleiki og álítandi
Við opinleika gerast vit betri, bæði inneftir og úteftir.
Vit eru opin fyri okkara starvsfeløgum og deildum, tí vit trúgva at hetta skapar bestu úrslitini fyri okkum sjálvi, viðskiftafólk og Umhvørvisstovuna.

Førleiki
Er eitt natúrligt mál hjá øllum at hava.
Kundin skal ongantíð ivast í, hvørjar førleikar vit hava í okkara virksemi.
Drívmegin er kenslan av at brúka okkum sjálvi og okkara førleikar.

At skapa broytingar í broytingum.
Vera opin fyri at tað eru ymiskir mátar at loysa uppgávuna uppá.
Lurta eftir ymiskum uppfatanum.

*Raðfest starvsfólkavirði*
Teir starvsfólkaførleikar, sum stovnurin raðfestir, og sum liggja til grund fyri starvsfólkametingum, eru fylgjandi:
- Dugnaligheit og effektivitetur
- Fleksibilitetur og arbeiðsførleikar
- Jaligheit og sosial virðisskapan fyri allan stovnin.

# Kort&Skráir

### Geodætiska grundarlagið

Í fjør byrjaði arbeiðið at bøta um geodætiska grundarlagið í Føroyum. Arbeiðið er umfatandi og gongur yvir fleiri ár.

*RTK*

Permanent basa er uppsett á skjøldurin á Umhvørvisstovuni, og síðani 23. jan. 2009 hevur basan sent út korrektiónir, soleiðis at til ber at gera RTK- uppmátingar í Tórshavnar-økinum.

Kannast skal, um fleiri permanentar støðir skulu setast upp til dømis í Klaksvík, Sørvági og í Suðuroy. Hetta kundi verið gjørt í samstarv við Landsverk og SEV.

Eisini eigur at kannast, um vit, umframt at senda korrektiónir út við radio, eisini skulu senda hesar út sum GSM signal.

*Nivellement*

Í vár og summar er ætlanin at fyrireika og gera rullandi trigonometriskt nivellement hesi strekki:

- Sørvágur - Klaksvík
- Tórshavn - Eiði
- Evt. Sandvík - Sumba

Arbeiðið skal gerast sum eitt samarbeiði millum KMS, Landsverk og US

*Statisk gps máting*

Ætlanin er at gera statiskar málingar, so minst eitt álítandi fixpunkt er í hvørji bygd/býi.

US og KMS standa fyri arbeiðinum.

Kortlegging

Grundkort og myndakort skulu gerast. Undirstøðukervi fyri lendislýsing skal somuleiðis halda á

### Flogmyndir

*Fotoflúgving 2009*

Ætlanin var at taka flogmyndir í 2008, men tað eydnaðist ikki, hóast flogfarið var í Føroyum nakrar dagar. Nú verða tað so heili 5 ár síðani seinastu flúgving, sum var í 2004, og tí er tørvurin á nýggjum myndatilfari enn størri. Roynt verður tí aftur at fáa flúgving í lag í 2009.

*Skanning av gomlum flogmyndum*

Elstu landsdekkandi flogmyndirnar yvir Føroyar eru frá 1958. KMS eigur myndirnar, og teir siga, at við tíðini farast slíkar myndir. Í Danmark eru teir farnir í gongd við at skanna teirra flogmyndir, og hetta eigur eisini at verða gjørt við myndirnar av Føroyum. Um tað er ein fíggjarligur spurningur, so er lítið at ivast í, at fleiri í Føroyum vilja vera við til at gjalda, um tey afturfyri fingu atgongd til skannaða tilfarið.

**Skráir**

US rekur í dag 4 av teimum týdningarmestu skráunum í landinum. Skráirnar liggja á ymiskum skipanum ymisk støð. Eitt miðvíst arbeiði at fáa skráirnar at "tosa saman" eigur at setast í gongd.

*Adressuskrá*

Arbeitt verður fram ímóti, at øll í Føroyum hava adressur síðst í fyrsta ársfjórðingi.

*Landsfólkayvirlit*

Miðað verður eftir at hava útboðstilfar til nýtt LFY klárt miðskeiðis í 2009. Beinanvegin í 2009 verður byrjað at fyrireika tað nýggja LFY:

1. L-talið verður lagt inn í verandi LFY og knýtt at tí einstaka persóninum.
2. Arbeitt verður við at konvertera verandi pseudo P-tøl til vanlig P-tøl, herundir samskifti við aðrar stovnar.
3. Ynskiligt er at fáa betri dátudygd, og at fáa gjørt mest møguligt av hesum arbeiði í verandi LFY, so klárt er at flyta til tað nýggja LFY, m.a. við at knýta foreldur og barn saman.
4. Ynskiligt er at fáa formellar reglur um umsiting av LFY – kunngerðir, rundskriv, herundir samstarv við kommunur.

*Tinglýsing*

Nú adressuskráin er um at vera liðug, eigur henda at knýtast saman við tinglýsingina, soleiðis, at til ber at sláa adressuna upp í tinglýsingini. Í dag er neyðugt at kenna matr.nr. fyri at fáa upplýsingar úr tinglýsingini. Tað átti ikki at verið so umfatandi arbeiði at fingið hetta gjørt, tí talan verður ikki um nakað manuelt arbeiði. Knýtið millum matr.nr. og adressu kann nevniliga gerast maskinelt.

*Matrikulin*

Sí ætlan hjá Lendi

**Kortforrit**

Vit hava í løtuni hesi kortforrit (cad ella gis forrit):

- MicroStation
- PowerMap
- ArcGis

Forritini hava ymiskar styrkir, alt eftir, hvat tey skulu brúkast til. Ætlanin er at útbreiða hesi forrit til allan stovnin, soleiðis at øll fáa atgongd til kort og myndir. Ætlanin er eisini at læra fólk at brúka hesi forrit.

**Heimasíðan**

*Skráseting av staðanøvnum*

Tað eru nógv, sum skráseta staðanøvn, bæði einstaklingar og felagsskapir. Ofta fáa vit fyrispurningar um, hvussu hesi kunnu staðfestast á kortum. Eitt hugskot hevði verið, at fólk kundu skrásett staðanøvn á eini heimasíðu sum www.kagi.fo, og at tilfarið á tann hátt bleiv alment tøkt.

**Samstarv**

*Fund við leiðsluna í KMS um ymiskt samstarv*
Ætlanin er at skipa fyri fundi við KMS í vár

*Norðurlendskur kortstjórafundur 2010*
Í 2010 verður norðurlendskur kortstjórafundur í Føroyum. Í hesum sambandi skal ymiskt arbeiði fyrireikast skjótt:

- bílegging av fundarhøli
- bílegging av hotelrúmum
- gera PowerPoint við innbjóðing at koma til Føroyar

# LENDI

**Ein vælvirkandi matrikul**
Álítandi og dygdargóð eigindómsviðurskifti eru ein fortreyt fyri, at samfelagið riggar og framhaldandi kann mennast.Matrikulin er grundarlagið undir eigindómsskrásetingini.

*Broytt lóggáva og hækkaði gjøld*
IMR hevur sent uppskot til broytingar í matrikullógini til hoyringar, og samstundis er eisini í umbúna at hækka gjøldini munandi. So umfatandi broytingar av kørmunum, vit arbeiða innanfyri, fara at merkjast í málsviðgerðini. Avbjóðingin verður at lofta broytingunum so skynsamiliga og lagaliga, sum til ber. Hetta so endamálið við broytingunum verður rokkið, samstundis sum støðið á matriklinum verður hildið og ment.

*Minka um sakarmongdina*
Arbeiðstrýstið er stórt - ov stórt, og er tað fyrst og fremst tí stóru sakarmongdini fyri at takka. Við givnum kørmum, hvat fólki viðvíkir, er avmarkað, hvørjir møguleikar eru at víðka um arbeiðsorkuna. Tí verður tað mest í mannagongdunum, at batar skulu finnast. Talið á nýggjum málum hava vit tó bert í lítlan mun ávirkan á, men hægri gjøld fara óivað at minka um talið á nýggjum sakum, og búskaparliga afturgongdin í samfelagnum ber á sama borðið. Inntøkugrundarlagið verður eyðvitað ávirkað.

*Stytta um avgreiðslutíðina*
Miðað verður móti, at vanliga sakarviðgerðin í tíð er niðan fyri 3 mðr. Er málið ikki avgreitt innan normtíðina, skal umsøkjarin hava boð um, hví so er. Liðir í hesari tilgongd eru betri kunning á heimasíðu og eitt nú mótvegis kommununum, og at kanna møguleikar fyri avgreiðslu um heimasíðuna.

*Framhaldandi digitalisering*

- Skanning av málibløðum.
- Skanning av savni.
- Teldutøkt samskifti millum skráirnar í húsinum:
- matrikul, tingbók, adressuskrá og fólkayvirlit.
- Bøta um dygdina á matriklinum og kanska serliga matrikulkortinum:
- ný-matrikuleringar (áir, neyst ..)

- adressur á lutirnar
- GIS meiri enn CAD
- Standardisering / Inspire
- Spesialisering, mátihold, teknistova ..

*Nýggj journalskipan*

Matrikulin verður partur av nýggjari journalskipan, sum fevnir um allan stovnin. Avbjóðingin verður at fáa allar verandi funktiónir við, og framhaldandi at menna skipanina, so høvuðsendamálini verða rokkin. Fyrispurningar um og móttøka av umsóknum (sakum) verða løgd til móttøkuna. Alsamt verður bøtt um møguleikarnar at gera betri hagtøl.

*Bøtt mátitøkni*

- Nýggj GPS-tøkni verður tikin í nýtslu
- Mannagongdir við uppmáting og avseting verða samsvarandi dagførdar
- Instrumentgoymslan

*Søgan*

Í 2008 vóru 60 ár, síðan Matrikul- og útskiftingarstovan varð sett á stovn.

- Vit eiga at fáa savnað og lýst søguna hjá eigindóms- og kortleggingararbeiðinum her á landi.
- Tíðliga í árinum skal gerast ein ætlan, og fólk fáast at arbeiða við evninum.

**Útskiftingin heldur á**

Er eigindómsbygnaður ikki so lagaligur, sum hann kundi verið, ber til hjá eigarum at krevja, at bøtt verður um viðurskiftini við útskifting. Matrikul og tingbók eru grundarlagið undir útskiftingunum.
Hvalvík. Roknskapurin skal gerast endaliga upp.

Kunoy og Syðradalur. Seta mark millum hús. Gerast upp.

Hestur. Arbeiðið at leggja út eigindómin av nýggjum skal raðfestast. 1 ársverk.

Gjógv. Uttangarðsútskifting. Planur skal gerast og leggjast fram tíðliga í 2009.

Depil og Svínoy. Uttangarðsútskiftingar. Nevndarlimir uppnevnast. Fundir tíðliga í 2009.

Sørvágur. Uttangarðsútskifting. Nevndarlimir uppnevnast. Fundur tíðliga í 2009.

Depil, Norðskála. Innangarðs. Eru farnar í gongd. Uppmáting evt. bjóðast út.

Strendur, Kvívík. Kannað verður, hvussu og nær til ber at fara undir tær størru útskiftingarnar.

**Holl lendisskipan?**

Burðardygg nýtsla og vernd av lendi og náttúru treytar, at heildarsjónarmið liggja sum grund fyri reguleringum av lendi og bygging. Matrikul, tingbók og lendisskipanir eru hornasteinar í hesum arbeiði.

*Býarskipanarnevndin*
Saman við IMR at leggja ætlan fyri, hvussu býarskipanarnevndin og serliga sekretariat hennara skal virka og innan hvørjar karmar.

- Manning
- Fíggjarligir karmar

*Menna planleggingina*
Staðfesta og menna lutin hjá stovninum og deildini innan føroyska lendisskipan.

- Mæla til og stuðla eini endurskoðan av lógargrundarlagnum
- Samstarv tvørtur um deildir.
- Fyriskipa kunning / vegleiðing / rundskriv
- Plan-ráðstevna !

*Planskrá*

Seta í verk og samskipa føroyska planskrá.  Samb. uppskot um lógarbroyting

- Lógarbroytingin
- Standard
- Kravspecifikatión fyri planskrá
- Manning / fígging

**Deildin**
Alsamt skal arbeiðast við at menna deildini fakliga og viðvíkjandi trivnaði.

*Viðseting / rekruttering*

Eyðsýnt er, at tað er ein stór avbjóðing at seta við fólk á matrikul- og útskiftingarøkinum.  Tí mugu vit:

- Gera arbeiði okkara sjónligt í almenna rúminum og prógva samfelagsliga virðið
- Gera vart við fak okkara og møguleikarnar fyri útbúgving
- Skipa innanhýsis upplæring/skeið/kunning
- Taka inn hjálparfólk

*Arbeiðsumhvørvið*

Fakliga og sosialt skal tað vera í topp at vera partur av deildini og stovninum:

- Trivnaður, kjak, opinleiki
- Deildarfundir, temadagar,
- Førleikamenning, skeið, sjálvlestur
- Starvsfólkasamrøður
- Innanhýsis integratión á stovninum

# VERND

Á ársætlanarfundinum í januar 2009 bleiv mett, at fylgjandi umhvørvistrupulleikar vóru mest átrokandi:

Veðurlagsbroytingar
Dálking frá virkjum og virksemi
Dálkaðar áir
Burturkast og órudd í náttúruni
Nýtsla og útlát av kemikalii / vørum og tilfari
Oljudálkingar
Skemmandi og fyrilitarleys inntriv í náttúruna, fallandi lívfrøðiligt margfeldni
Niðurbróting av ozonlagnum

Niðanfyri eru øki, sum Vernd hevur raðfest fyri 2009:

**Umhvørvisgóðkenningar/ kap. 5**

- Umhvørvisgóðkenning av orkuverkum, asfaltverkum og oljugoymslum
- Betongblandistøðir
- Skipasmiðjur
- Flogvøllur
- Alistøðir
- Vegleiðing til fiskavirkir
- Dagføra standardtreytir
- Staðfesta markvirðir

**Kap. 5 eftirlit**

- Gera mánaðarliga eftirlitsætlan
- Fokus: órudd, oljuskiljarar og sápa

**Burturkast**

- Statusfundi við IRF og KB
- Flutningur av burturkasti millum lond – upprit
- Rottangatøming í Tórshavnar kommunu
- Upprit um ES fyriskipan – animal waste og umhvørvisfyrisiting

**Frálandavirksemi**

- ENI útleiðingarloyvi ísv royndarboring

**Veðurlagsøkið**

- Uppfylging av "Skjótt syftir seiðir"
- Faldari um Skjótt syftir seiðir í gerandisdegnum
- Sjónliggerð av orkunýtslu – verkætlan
- COP 15 – avklárast við IMR

**Tilbúgving**

- Tilbúgvingarætlan fyri dálking á sjónum.
- Venjing
- Dagføra US innanhýsis tilbúgvingarætlan
- Fylgja arbeiðinum við kjarnorkutilbúgvingini

**Umhvørvishagtøl**

- Veðurlagsgass – greina skipabólkin
- Burturkasthagtøl
- Einnýtisíløt
- Ozon-oyðandi evni
- Oljudálkingar

**Náttúruvernd**

- Byrja eitt kortleggingararbeiði

**Kemikaliir**

- Skipa fyri temadegi um kemikaliifyrisiting /REACH

**Kortleggingar**

- Dagføra GeoAling
- Yvirlit yvir kap. 5
- Kort yvir viðkvæmar strandaleiðir flytast yvir í GIS skipan á US
- Upplýsingar um náttúruvirðir

**Oljudálkingar**

- Frágreiðing um oljudálkingar

**Ozon-oyðandi evni**

- Tørvur á reglugerð – liggur hjá IMR

**Einnýtisíløt**

- Upprit um Dansk retursystem
- Eftirmeting av skipanini – tilmæli til IMR
- Eftirlit

**Órudd**

- Vegleiðing til kommunur
- Uppfylging, kommunur

**Spillivatn**

- Dagføra statusyvirlit 2006
- Vegleiðing til kunngerð – fylgiskjalið um kort

**EMS-light**

- Endamál gerast sjónlig á US
- Mátingar og skrásetingar – el, olja og pappír
- Kunning og motivatión

**Kunningarátøk**

- Kommunufundur
- Faldari um burturkast frá skipum á enskum og russiskum
- Faldari um *Børn og kemisk evni* – møguliga prentast uppaftur
- Søkja um pening frá játtanini til umhvørvisverndartiltøk

Skeið, førleikamenning og temadagar

- Innanhýsis skeið um óljóð
- REACH
- Skipa fyri skeiði um spillivatnsreinsing e.l. – møguliga saman við Teknologisk Institut

# GRANSKING

Deildin arbeiðir nógv við verkætlanir. Í 2009 er ætlanin at arbeiða við teimum verkætlanum, sum eru vístar í talvuni niðanfyri. Verkætlanirnar eru í stóran mun fíggjaðar uttaneftir, tó er t.d. ein ávís eginfígging íroknað verkætlanir, sum Norðurlendska ráðharraráðið fíggjar. Eginfíggingin er tá helst partur av tí tíð, sum fer við at samskipa, leggja ætlanir og savna sýnir saman, meðan eksterna fíggingina verður nýtt til kemiskar kanningar.

Nú skipanin á stovninum er løgd, og arbeiðshølini eru við at verða liðugt innrættaði, verður arbeitt við at finna stevið fyri deildini við serligum atliti til økið "umhvørviskanningar av dálkandi evnum og árin av hesi". Miðað verður eftir at fáa uppafturtikið eina føroyska umhvørviseftiransingarskipan, við støði í kanningarætlanum, sum eru gjørdar í OSPAR høpi. Størsti aktiviteturin verður tó helst framvegis innan AMAP kanningarskránna. AMAP kanningar eru tengdar at uttanhýsis fígging, eins og annað arbeiði, sum kemur at fara fram á deildini í 2009.

Ætlanin er at styrkja deildina við fyribilssettum vísindaligum starvsfólki í 2009. Tørvur er á at styrkja kunningarvirksemið hjá deildini, og væntandi verður sett eitt fólk á US, sum kann vera við til at fremja hetta. Í tann mun arbeiðsorka verður til tess, verður eisini arbeitt við at skriva mannagongdir fyri kanningarnar, sum verða framdar regluliga, og at reka og menna sýnisprøvabankan.

**Verkætlanir sum halda fram í 2009**

- AMAP 2007-2008 (fígging: Miljøstyrelsen, DK)

Úrslit frá AMAP kanningum í tíðarskeiðinum 2005 til 2009 verða savnað og viðgjørd í frágreiðing og greining av møguligari tíðstrend í POPs, og tungmetal-úrslitini verða gjørd í alltjóða samstarvi.

- "Nye" POPer i marine pattedyr i Nordiske Arktiske havområder over tre decennier (fígging: Norðurlanda ráðharraráðið).

Endamálið er at kanna innihaldið av nøkrum nýggjum umhvørviseitrandi evnum í havsúgdjórum og broytingar í hesum seinastu tredivu árini. Teir tríggir bólkarnir av umhvørviseitrandi evnum, sum verða kannaðir, er bromeraði flammutálmandi evni (BFR) í 2008, og um fígging fæst, sum roknað við; PFAS og PCN í 2009.

- Frágreiðing um oljudálking (Olshana og Vági) (fígging: Heilsufrøðiliga starvsstovan/US)

Frágreiðingin savnar kunnleika til oljudálking og árin frá hesi, sum eru staðfestar í Føroyum. Frágreiðingin byggir serliga á umhvørviskanningar, gjørdar aftaná Olshana sakk og aftaná lekan frá oljutangunum í Vági.

- Seyrar dioksin og PCB frá fleiri tyrvingarplássum? (fígging: US)

At kanna eitt breitt úrval av tyrvingarplássum runt um í Føroyum, fyri at vita, um lendið har/rundanum er nýtiligt til t.d. seyð at ganga á. Fer innihaldið av umhvørviseitrandi evnum upp um eitt ávíst, eigur nýtslan/atkomuligheitin til lendið at verða avmarkað.

**Verkætlanir, sum væntandi byrja í 2009**

- AMAP 2009-2010 (fíggarumbøn til Miljøstyrelsen, DK)

Fremja eina regluliga AMAP kanningarætlan í samsvari við altjóða avtalu og við atliti til serligar føroyskar umstøður. Halda fram við kanningararbeiði, sum hevur verið gjørt við støðugum batum síðani 1997. Í nýggju verkætlanini verður seyður tikin við aftur í kanningarskránni, og verður harafturat kannaður fyri PFAS.

- Norðurlanda screening av bromeraði flammutálmandi evnum (fíggarumbøn til Norðurlanda ráðharraráðið).

Endamálið er at kanna innihaldið av nøkrum nýggjum umhvørviseitrandi evnum í umhvørvinum á útvaldum plássum/sýnir í Norðurlondum. Kanningin verður framd eftir sama leisti, sum norðurlanda screenings-kanningar hava verið gjørdar t.d. av PFAS, siloxanir og fenolir (sí www.nordicscreening.org). Kanningin verður koordinerað við kanningini *”Nye” POPer i marine pattedyr*, omanfyri. Verkætlanin er tengd at fígging, sum endalig støða verður tikin til 10. mars 2009.

- Umhvørviseftiransing – minimumsætlan (fígging:US)

At fremja eina minimums kanningarætlan sambært føroyskum áhugamálum, og við støði í pørtum av útvaldum altjóða sáttmálum, sum t.d. OSPAR, IMO-TBT og UN-ECE LRTAP. Kanningarskrá fyri 2009-2011 er gjørd og fevnir um kanningar av umhvørviseituri í fiski, hvali, seyði, mosa, purpurkúvingum o.ø.

- Havnarvág: kanning av dálkingarstøðuni vegna Tórshavnar kommunu (fígging Tórshavnar kommuna).

Verkætlanin hevur til endamáls at greina umhvørvisstøðuna á vágni við serligum atliti til at lýsa møguligar broytingar. Sýnir av sedimentum og vatni vórðu tikin í 2008, og kanningarnar verða væntandi framdar í 2009.

- Kanning av grindahvalastovninum; er úrtøkan burðardygg? (Fígging?)

Ein NAMMCO serfrøðingabólkur hevur í 2008 gjørt eitt uppskot til kanningarætlan, sum hevur til endamáls at greina, hvørt úrtøkan av grindahvali í Føroyum er burðardygg. Formligu viðurskiftini eru ikki avtalaði. Kanningin byrjar møguliga við sýnistøku í 2009.

- Heilivágsleivdir á vágni? (Um fígging fæst)

Í øðrum londum (USA og Evropa, íroknað Norðurlond) eru staðfestar heilivágsleivdir í yvirflatuvatni, grundvatni og drekkivatni. Í kanningini verða sýnir heintaði av sjógvi úr Havnarvág, og hesi verða kannaði fyri heilivágsleivdir.

# Viðarvøkstur og frílendi (V&f).

Umsiting av viðarlundum og øðrum frílendum, saman við veitingarvirkseminum av plantutilfari á Gróðurstøðini, eru týðandi borgaratænastur. Til tess at kunna røkja og støðugt menna hesar tænastur, krevst eitt vælútbúgvið, vælútgjørt og vælmotiverað starvslið. Ein týðandi partur av undirstøðukervinum er somuleiðis eitt áhaldandi arbeiði at finna fram vælegnað plantutilfar til føroysk vakstrarlíkindi (higartil hevur virksemið tó bert fevnt um viðarvøkstur – lignosur – t.e. trø og runnar).

Tíðin er tó ivaleyst komin hartil, at rætt er at umhugsa eitt breiðari virkisøki í sambandi við plantuvøksturin á Gróðurstøðini, nevniliga prýðisvøkstur í síni heild (t.e. eisini staudir og aðrar perennir eins og summarblómur o.tíl.), soleiðis at føroyski marknaðurin gjøgnum royndir fær tilgongd til nýtt, vælegnað plantutilfar.

Viðarlundir og onnur frílendi av slíkum slag verða nógv vitjað av borgarunum, bæði á bygd og í bý. Her sæst sama gongdin, sum eisini ger seg galdandi úti í heimi, har spurningurin um fólkaheilsu og trivna er sera frammarlaga í raðfestingini av tænastuveitingum frá hesum lendum. Annað mál, ið eisini er nógv frammi uttanlands, og sum ávís fólk eisini eru byrjað at umrøða her heima, er viðarvøkstur og koltvísúrnibinding ($CO_2$ sequestration). Hesi bæði evni koma ivaleyst eisini at verða partur av heimligu umrøðuni kring menning av nýggjum viðarlundum og øðrum frílendum komandi tíðina.

Tey netverk og fakligu sambond, sum V&f hevur til starvsfelagar úti í heimi, eru sera týdningarmikil og mennandi fyri virksemið her heima. Tí eigur ein virkin leiklutur at halda fram á hesum bógvi, hóast fíggjarligu útlitini framyvir eru vorðin daprari.

Nýtilnevnda Skógfriðingarnevndin (nov. 08) hevur fingið eitt 6 ára virkisskeið frá Innlendismálaráðnum, ið gevur spennandi karmar at samvirka undir til menning av málsøkinum. Í hesum sambandi er eyðsýnt eisini at taka til viðgerð tørvandi dagføringar av lóggávugrundarlagnum, bæði fyri virksemið knýtt at viðarlundunum, men eisini fyri m.a. frílendismál (fríluftslívsáhugamál) í breiðari merking. Skógfriðingarnevndin var umboðað á donsku fakmálsráðstevnuni Skov & landskabskonferencen 2009. Miðað verður eftir, at nevndin fær vitjað so nógvar av viðarlundunum kring landið, sum gjørligt, í 2009.

### V&f sum deild

Fakligi førleikin á V&f skal áhaldandi viðlíkahaldast og mennast. Stevnumiðið eigur at verða eitt fakligt avrik á javnbjóðisgóðum, norðurlendskum støði. At V&f starvsliðið hevur heimbýlisstað í Hoydølum setur krøv til áhaldandi samansjóðing við restina av US úti á

Argjum. Ein virkin starvsfólkapolitikkur, m.a. við deildarfundum javnan (starvslig áhugamál, opin og tvívegis kunning, dagsaktuel fakmál o.s.fr.), góðum arbeiðsumstøðum og dagførdari arbeiðsútgerð, dagførdari fakmálsvitan og jaligum hýri, skulu gera V&f til eitt gott og avhildið arbeiðspláss.

Áður ráddi tann hugburður manga staðni í føroyska samfelagnum, at einhvør, ið megnaði at handfara ein spaka, var førur fyri at arbeiða við lendisrøkt, vøkstri o.tíl. innan grøna geiran. At tørvur var á fakligari vitan í hesum viðurskiftum, lá fjart í hugaheiminum. Tíbetur er broyting komin í, og US og serliga V&f eiga at kenna ábyrgd fyri at ganga undan, og at leggja sín lut í at menna eitt dygdargott fakligt umhvørvi fyri grøna geiran í Føroyum.

Á Skov & Landskab í Danmark (http://www.sl.life.ku.dk/OmSkovOgLandskab.aspx) hava lærarar víst áhuga fyri møguleikanum at senda teirra næmingar og lesandi í styttri ella longri starvsvenjing í Føroyum, eftir sama leisti sum gjørt verður við m.a. hini Norðurlondini. Hesin møguleikin gerst enn meira eyðsýndur við fakligu breiddini undir núverandi US kørmunum. Vónandi kunnu slíkar skipanir eisini skapa størri áhuga millum føroyskan ungdóm at søkja sær útbúgvingar, bæði handaligar og akademiskar, innan grøna geiran, soleiðis at sett kann verða við á fakøkinum.

Fakøkið hevur siðvenju fyri miðvísari førleikamenning, og hetta eigur at halda fram í 2009. Røktarleiðararnir eiga at kunna luttaka á í minsta lagi 1 útlendskum skeiði/ráðstevnu um árið at søkja sær vitan og fakligan íblástur. Á deildarfundi í februar varð spurningurin um skeið og aðra fakliga útbúgving/menning gjøgnumgingin við starvsliðið. Ítøkiligar ætlanir fyri hvørt einstakt starvsfólk kunnu vónandi spyrjast burtur úr m.a. starvsfólkasamrøðunum, ið verða í februar/mars mánað.

Á deildini er 1 gartnaralærlingur á Gróðurstøðini (produksjónsgartnari - verður avlærd í 2011). Umhugsað eigur at verða, hvørt Gróðurstøðin skuldi tikið 1 gartnaralærling aftrat í ár, soleiðis at hálvrunnið útbúgvingarskeið verður ímillum hvønn lærlingin. Áhugin fyri at koma í læru tykist vera góður, fakligu avbjóðingarnar somuleiðis góðar, og okkara gartnaralærlingar hava staðið seg ógvuliga væl millum javnlíkarnar á donsku yrkisskúlunum.

Í viðarlundunum er somuleiðis høvi at taka lærling til Skov- & naturtekniker, sí http://www.sl.life.ku.dk/Uddannelse/SkovOgNaturtekniker/Uddannelsen.aspx Hesum eigur somuleiðis at verða farið undir, helst longu í 2009.

Tørvur er eisini á at styrkja og menna V&f við akademiskum starvsfólki (typiskt forstkandidati, natúrforvaltningskandidati, landslagsarkitekti, havabrúkskandidati ella landbúnaðarkandidati), serliga við atliti til víðkað virkisøki innan frílendis- og náttúrubrúk og ráðgeving.

Av innanhýsis, tvørdeildarligari menning/eftirútbúgving í US høpi er serliga at nevna kortskipanir, kortforrit, GPS, GIS og náttúru/umhvørvi til starvsliðið á V&f. Miðað verður eisini eftir, at V&f fær skipað eitt vælvirkandi samstarv við Gransking at styðja seg til í samband ymiskar (serliga uttanhýsis) G&m verkætlanir.

V&f má gerast dugnaligari at kunna um sítt virkisøki, bæði innanhýsis í US høpi, og út til borgaran. Ein virknari leiklutur á www.us.fo er eyðsýndur í hesum høpi, og á deildarfundinum í februar varð áherðsla løgd á at fáa alt starvsliðið virkið við í hesa tilgongd.

Stórur tørvur er á skipaðari kunning við talvum o.s.fr. í viðarlundunum o. ø. frílendum; serliga við kortúrdrøgum, leiðreglum, søgu- og vakstrarupplýsingum v.m. Tað eigur at verða hildið fast við konseptið fyri skelting í náttúruni v.m., sum Tórálvur Weihe, arkitektur, á sinni gjørdi, og sum Ferðaráð Føroya gav út í bóklingi í 2001.

**Gróðurstøðin**

- Arbeitt verður víðari við ætlanini um nýggjar driftsbygningar
- Støða má takast til møguliga drívhústunnil aftrat
- Hildið verður fram at menna alingina av føroyskum uppruna viðarvøkstri (*Salix sp.* og *Juniperus communis*)
- Hildið verður fram við royndum at menna vegetativa framleiðslu av *Nothofagus sp.*)
- Arbeitt verður víðari við ætlanini at ala fram størri trø
- Eginframleiðslan av trøum og runnum verður ment
- Ætlandi verða plantur keyptar úr Danmark, Íslandi og evt. Skotlandi í 2009. Sum altíð, verður Phytosanitary Certificate kravt frá veitarunum
- Meira verður gjørt burturúr at sanka vælegnað føroyskt fræ- og alitilfar
- Betri kunningartilfar um plantur, plantuhandfaring og val av plantutilfari til viðskiftafólk

**Viðarlundirnar**

- Hildið verður fram við trærøktini (tynning, tilskering v.m.) í skógfriðaðu viðarlundini í Gundadali
- Hildið verður fram við trærøktini (tynning, tilskering v.m.) í skógfriðaðu viðarlundini í Niðastu Hoydølum. Støða verður tikin til evt. spælipláss har
- Hildið verður fram við trærøktini (tynning, tilskering v.m.) í skógfriðaðu viðarlundini í Trongisvági
- Farið verður undir trærøkt í skógfriðaðu viðarlundini í Leirvík (Limmulundini)
- Farið verður undir trærøkt í skógfriðaðu viðarlundini í Mikladali
- Hildið verður fram at menna skógfriðaðu viðarlundina í Langadali í Hoyvík
- Hildið verður fram at menna skógfriðaðu viðarlundina í Marknagili í Havn
- Hildið verður fram at menna skógfriðaðu viðarlundina inni í Dølum í Kirkjubø við føroyskum upprunaviðarvøkstri
- Hildið verður fram við menning av viðarlundarlendinum við Sjatlá í Vatnsoyrum
- Samstarv við Vága kommunu um nýlendi, kommunan hevur keypt at leggja aftrat skógfriðaðu viðarlundini á Abbreyt í Sandavági
- Samstarvið við Tvøroyrar kommunu um at røkt og eftirlit við skógfriðaðu viðarlundini á Sevmýru móti gjaldi heldur fram í 2009
- Miðað verður eftir at gera lendisábøtur kring Hoydalshylin o.a. á Skraddaratrøðni

- Samstarv við Vágs kommunu um ábøtur á gøtuskipanina í skógfriðaðu viðarlundini í Hvannadali í Vági
- Samstarv við Tvøroyrar kommunu um skipan av nýlendinum, kommunan hevur keypt aftrat skógfriðaðu viðarlundini í Trongisvági
- Samstarvið við Tórshavnar kommunu um røkt av skógfriðaðu lendum kommununar móti gjaldi av útreiðslunum heldur fram í 2009
- Samstarvið við Magna Laksáfoss og Sunda kommunu um gøtuskipan v.m. í skógfriðaðu viðarlundini á Tøðuni í Hvalvík heldur fram
- Bøta um skelting, ruskíløt beinkir o.tíl. í viðarlundunum
- Støða takast til viðarlundarlendi IMRs á Sevmýru
- Uppskot til skipan gerast fyri almennu frílendini av Boðanesi í Hoydalar